## Ímóti hvalaveiði

Íslendska ferðavinnan var alt annað enn fegin, tá stjórnin í fjør loyvdi hvalabátum at skjóta nakrar hvalir, og nú hevur vinnan aftur heitt á stjórnina um at steðga allari hvalaveiði. Á ársaðalfundi í gjár samtykti felagsskapurin hjá íslendsku ferðavinnufyritøkunum eina yvirlýsing, har sagt verður, at umdømi Íslands er tað týdningarmesta, tá tað snýr seg um samhandilin við umheimin, og hvalaveiðan er ikki av tí góða í so máta.

## Nýskipan útsetast

Grønlendska landsstýrið hevur samtykt eina kommunala nýskipan, sum millum annað ber í sær, at tær verandi 18 kommunurnar verða lagdar saman í fýra kommunalar eindir. Skipanin skal koma í gildi 1. januar í 2009, men nakrir borgarstjórar mæla nú landsstýrinum til at bíða við at seta skipanina í gildi. Borgarstjórarnir vísa á, at lyftið hjá landsstýrinum um at spara 220 mió. krónur við at leggja kommunurnar saman halda ikki.

# Nýggjan flogvøll um átta ár

**Stendur tað til landsstýrismannin við vinnumálum, so er flogvøllurin í Vágum liðugt útbygdur í 2010, meðan ein heilt nýggjur vøllur á Glyvursnesi ella í Søltuvík er klárur at taka í nýtslu fimm ár seinni**

SAMFERÐSLA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sum Sosialurin skrivaði í gjár, verður flogvøllurin í Vágum yvirtikin 1. mei. Hetta hendir í sambandi við ætlaðu útbyggingina, har fíggingin endaliga er komin upp á pláss, eftir at Fólkatingið við 3. viðgerð í gjár samtykti at játta 365 mió. kr. úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar til endamálið.

Lagt er upp til, at vøllurin skal leingjast úr 1.250 upp í 1.600 metrar. Eitt norskt felag hevur kannað, hvat loysir seg best, og hesar kanningar vísa, at mest fæst fyri peningin við at leingja vøllin 350 metrar.



*- Útbyggingin av flogvøllinum í Vágum hastar og kann ikki bíða, sjálvt um vit taka avgerð um at byggja ein nýggjan vøll, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum*

*Savnsmynd*

Politikararnir eru sum heild samdir um, at útbyggingin ikki kann bíða, tí flotin hjá Atlantsflog bestendur av flogførum, ið ikki verða framleidd longur, og sum frálíður mugu skiftast út við størri flogfør frá Airbus ella Boeing.

Fyritreytin fyri fáa størri flogfør inn á Føroyaleiðina er at leingja vøllin.

Tað er ongin loyna, at landsstýrismaðurin í vinnumálum er heitur talsmaður fyri at byggja nýggjan vøll í Føroyum. Ella ein alternativna vøll, sum Bjarni Djurholm kallar tað.

Hann vísir kortini á, at sjálvt um avgerð skuldi verðið at bygt nýggjan vøll, so kann útbyggingin í Vágum als ikki bíða.

Spurdur um, nær kann roknast við, at vøllurin er liðugt útbygdur, sigur Bjarni Djurholm, at gongur sum ætlað, er longdi vøllurin klárur at taka í nýtslu í 2010.

### Umfatandi kanningar

Væntandi er klárt at leggja eina anlegslóg fyri í Ólavsøkutingsetuni, bjóða uppgávuna út næsta ár og at arbeiðið eisini kann byrja í 2008. Mett verður, at tað fer at taka tvey ár at gera arbeiðið, sum umframt at leingja sjálvan vøllin, fevnir um at útbyggja terminalin og nútímansgera ella dagføra alla ta teknisku útgerðina.

Sjálvur vøllurin verður longdur ímóti Leitisvatni, men í hinum endanum móti Sørvági skal eisini gerast eitt trygdarøki upp á eina 60 metrar móti Sørvági.

Stóra útbyggingin í Vágum steðgar tó ikki strembanini eftir at fáa bygt ein heilt nýggjan vøll í Føroyum. Enn er ikki greitt, hvar tað verður, men at hetta antin verður á Glyvursnesi ella í Søltuvík í Sandoynni.

Sambært Bjarna Djurholm eru kanningarnar av, hvar best er at leggja flogvøllin, so umfatandi, at tær í fyrsta lagi kunnu vera liðnar í 2011.

Kortini er landsstýrismaðurin so mikið bjartskygdur, at hann roknar við at tað fer at bera til at fáa ein nýggjan vøll tiknan í nýtslu í 2015.



*Endaliga kostnaðarmetingin av at útbyggja flogvøllin í Vágum er ikki gjørd enn, og tí er ikki greitt, um tær 365 mió. kr., sum Fólkatingið hevur játtað úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar, røkka til. Gera tær ikki tað, má Landskassin gjalda meirkostnaðin*

*Savnsmynd*

## Sjúkrasystrar velja nýggja nevnd

**Allir nevndarlimirnir í Sjúkrarøktarfrøðingarfelagnum skulu veljast av nýggjum, tá valið ikki fór fram við uratkvøðu, so sum tað eigur**

FAKFELAG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nýggja nevndin í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar boðar nú, at skipað verður fyri nýggjum nevndarvali til felagið. Orsøkin er tann, at sitandi nevnd varð vald á aðalfundi, meðan hon sambært reglunum eigur at verða vald við uratkvøðu.

Felagið sigur, at tá uppstillingarfreistin til formansvalið og nevndarvalið var úti hin 15. februar í ár var greitt, at tvey valevni vóru til formansvalið, men bert eitt valevni var til nevndarvalið.

Smáar tvær vikur seinni valdi annað valevnið til formansvalið at trekkja seg, og nú var greitt, at ikki var neyðugt við vali.

Støðan var ein onnur við nevndarvalinum, tí har var bert tað eini valevni til nevndina, sum vanliga telur seks limir umframt forkvinnuna. Táverandi nevnd felagsins valdi at skipa so fyri, at írestandi nevndarlimir skuldu veljast á aðalfundinum.

Sjúkrarøktarfrøðingar á Landssjúkrahúsinum mótmæltu skrivliga avgerðini og kravdu eykaaðalfund, men fingu ikki viðhald. Grundgevingarnar til hesa ónøgd vóru, at allir limir hava ikki møguleika at velja á aðalfundinum, tí fleiri fáa ikki møtt orsakað av teirra starvi.

Nýsetta stýrið fyri felagið boðar tí nú frá, at tað einmælt hevur valt at skipa fyri nývali til nevnd felagsins. Vár í Gong, forkvinna, sigur, at talan bert er um nýtt nevndarval – ikki forkvinnuval. Orsøkin er, at nevndarlimirnir eru ónøgdir við, at nevndin varð vald á aðalfundinum, og ikki við uratkvøðu, sum vanligt er.

Men nú fáa so allir sjúkrarøktarfrøðingar møguleika – bæði at stilla upp og at velja.

Freistin at stilla upp til nevndarvalið er mánadagin 23. apríl kl 13.